# GjaldSkipanin

Reglur fyri FI-skipanina

### §1 Vanlig uppkrøv (0110/0112)

Elektron móttekur leveransur við uppkrøvum frá kreditor. Hesar skulu verða Elektron í hendi í seinasta lagi 8. síðsta avgreiðsludag í mánaðinum undan gjaldmánaðin. Sektiónsslag "**0110/0112**" kann sendast til Elektron allar dagar í mánaðinum.

Elektron sendir kvittan aftur eftir treytunum í §11 í dátusamskiftisreglunum.

Er sjálvvirkandi gjaldsavtala er tilmeldað, sendir Elektron upplýsingar til Nets til víðari viðger. Er sjálvvirkandi gjaldsavtala ikki tilmeldað, sendir Elektron inngjaldskort við postinum til debitor.

Inngjaldskortið kann gjaldast og meldast til GjaldSkipanina í Netbanka, peningastovni ella á posthúsi *(bert gjalding)*.

Verður sjálvvirkandi gjaldsavtala frámeldað aftaná at leveransan er innkomin og fram til 5. síðsta avgreiðslu-dag í mánaðinum innan gjaldsmánaðin, sendir Elektron inngjaldskort við postinum ístaðin.

---

### §2 Uppkrøv við stuttari freist (0115)

Elektron móttekur leveransur við uppkrøvum frá kreditor. Elektron sendir kvittan aftur eftir treytunum í §11 í dátusamskiftisreglunum.

Sektiónsslag "**0115**" kann sendast til Elektron allar dagar í mánaðinum.

---

### §3 Rykkjarar (0116)

Elektron móttekur leveransur við rykkjarum frá kreditor. Elektron sendir kvittan aftur eftir treytunum í §11 í dátusamskiftisreglunum.

Sektiónsslag "**0116**" kann sendast til Elektron allar dagar í mánaðinum.

---

### §4 Inngjaldskort til allar debitorar (0117)

Elektron móttekur leveransur við rykkjarum frá kreditor. Elektron sendir kvittan aftur eftir treytunum í §11 í dátusamskiftisreglunum.

Sektiónsslag "**0117**" kann sendast til Elektron allar dagar í mánaðinum.

---

### §4 Tíðarfreistir

#### Vanlig uppkrøv (0110/0112)

Kreditor skal yvirhalda tað til eina og hvørja tíð galdandi tíðarfreist. Síðsta freist fyri innsending av mánaðarligu leveransunum "**0110/0112**" til Elektron er 8. síðsti avgreiðsludagur í mánaðinum innan gjalds-mánaðin.

Elektron hevur skyldu at senda rokningarnar, so tær eru debitori í hendi í seinasta lagi síðsta avgreiðsludag í mánaðinum innan gjaldsmánaðin.

#### Innkrevjingar við stuttari freist (0115)

Innkrevjingar við stuttari freist "**0115**" kunnu latast til Elektron allar dagar í mánaðinum. Elektron hevur skyldu at senda rokningarnar í seinasta lagi 5. avgreiðsludagar eftir móttøkuna av leveransuni.

#### Rykkjarar (0116)

Rykkjarar "**0116**" kunnu latast til Elektron allar dagar í mánaðinum. Elektron hevur skyldu at senda rykkjarnar í seinasta lagi 5. avgreiðsludag eftir móttøkuna av leveransuni.

---

**Inngjaldskort til allar debitorar (0117)**

Leveransa "**0117**" kann sendast til Elektron allar dagar í mánaðinum. Inngjaldskort verður sent til allar debitorar, óansæð um sjálvvirkandi gjaldsavtala er tilmeldað ella ikki.

Elektron hevur skyldu at senda rykkjarnar í seinasta lagi 5. avgreiðsludagar eftir móttøkuna av leveransuni.

---

## §5 Inngjaldsupplýsingar (0602/0692)

Eftir gjalding sendir Elektron inngjaldsupplýsingar "**0602/0692**" aftur til kreditor. Eina leveransu fyri sjálvvirkandi gjaldingar (**sektión 0211**), og eina fyri goldin inngjaldskort og sjálvvirkandi vinnuligar gjaldingar (**sektión 0215**).

---

## §6 Ábyrgd

Elektron hevur ikki ávirkan á innihaldið av fráboðanartekstum og hevur heldur ikki ábyrgd av hesum mótvegis debitori.

Elektron hevur ikki ábyrgdina av, at uppkravda upphæddin ella gjaldsviðurskiftini annars eru røtt.

Elektron hevur ikki ábyrgdina av, at postur verður rætt útborin aftaná at postsendingirnar eru latnar til Posta, og hevur heldur ikki ábyrgdina av returposti.

Hesin verður sendur aftur til kreditor, ið hevur ábyrgdina av at skráseta bústaðin rætt og síðani senda rokningina víðari til debitor.

---